

*Peruanska fótbóltslandsliðið til reiðar til undandystin í heimsmeistarakappingini móti Uruguay í Lima 7. juni í ár*



*Jefferson Farfan spælir í PSV, hann er eisini við peruanska landsliðnum*



*Claudio Pizzaro, ið spælir í Bayern München er eitt dømi um peruanskan fótbóltsleikara, sum klárar seg væl í altjóða fótbólti*

ciano var í Arequipa og leikti ímóti hinum fyrstideildarfelagnum Melgar. Melgar brúkar eitt heldur minnið stadion, við rúmi fyri einum 10.000 áskoðarum. Hóast dysturin var mikudag, so byrjaði hann kl. 15.30, tí ljósini ikki virka á hesum stadion. Hesin dysturin hevði meira ferð, og eisini var munandi meira lív í áskoðarunum, bæði tí at Melgar hevur fleiri fanatiskar viðhaldsbólkar, men eisini tí at nógv fólk úr Cuzco búgva í Arequipa, og tí vóru nógv Cinciano viðhaldsfólk eisini har.

## Væntandi taktikkur

Fótbóltsliga var søgan tann sama. Flottur teknikkur, men óskiljandi vánaligur taktikkur og yvirlit, t.d. blev onnur síðan av vølinum at kalla ikki brúkt. Tey nógvu og grovu fríspørkini settu sín dám á dystin, tó uttan at kort blivu givin í nóg stóran mun. Málmøguleikarnir vóru nógvir og góðir, og beint undan steðginum fekk Melgar brotsspark, sum tó bleiv brent. Í mun til fyrra dystin, var tað nú umvent í landafrøðini, tí Cuzco liggur í 4000 metra hædd og høvdu teir nú fyrimunin av hædd og harvið at orka betur. Men eisini hesa ferð spældi heimaliðið betri, og átta at vunnið. Einu ferðina var bólturin eisini beint innan fyri málstrikuna, og hóast tað kundi staðfestast í ítróttarsendingini á kvøldi, sóu hvørki dómari ella linjuverji bóltin inni. Cienciano hevði eydnuna, sum oddalið oftani hava, og skoraði til 1-0 uppá ein tilvildarligan møguleika. Skamt har frá eg sat, fóru nakrir áskoðar til hendurs, men góvust tá løgreglumenn komu upp ímillum. Men eftir dystin var rok. Fjepparabólkarnir eru heldur fanatiskir og onkur innantómur Melgarfjeppari byrjaði at kasta steinar uttan fyri stadion, og so kom vatnkanónbilur og tað heila. Einu løtuna slapst ongan vegin, alt var ein trunki av fólkamongd og løgreglufólki á motorsúklum og á hestbaki. Eydnutíð fekk eg sloppið mær avstað og í einum taxa til hús. Stríðið vardi í fleiri tímar, og løgreglan rak ótangarnar burtur við vatnkanónum og táragassi. Hóast nakað av roki, so var tað krás fyri mína fótbóltssál, at síggja teknik og detaljur og sera høgum støði.

## Samfelagið í fótbóltseygum

Sum sagt í byrjanini, haldi eg at Peru kann lýsast umvegis hesar fótbóltsdystir. Landið er sera ríkt í náttúruríkidømi, sum viðføddi fótbóltsteknikkurin, men tað verður ikki tilætlað brúkt nóg væl, sum kann sigast at vera tørvandi taktikkurin og yvirlitið. Landið er so fjølbroytt og fer so illa við sínum íbúgvum, at felagssamleikin og fosturlandskærleikin ikki er serliga sterkur. Tørvandi "Amor a la camisa" sæst aftur í tørvandi fosturlandskærleikanum og kensluni. Vanvirðingin av dómaranum og páhaldið um, at hann helst er mutraður allíkavæl, svarar til álitið á almennu skipanina, har flest øll halda at alt er mutrað.

## Miðsavnan

Miðsavninin í skipanini sæst í, at tað vanliga bert er feløg úr Lima, sum kappast um meistaraheitið. Í ár er talan um eitt undantak, at Cienciano úr Cuzko eru við í kappingini um meistaraheitið. Peruanska samfelagsskipanin er sera miðsavnað. Nærum ein triðingur av fólkinum býr í Lima og politiska, eins og fótbóltsskipanin, taka í flestu førum støði í heiminum sæð frá Lima, eins og tað vanliga bert eru feløg úr Lima, sum stríðast um meistaraheitið.

## Ymsar fortreytir

Landafrøðin vísir á ymsu fortreytirnar í Peru. Landið hevur eina langa strandalinju og tríggjar fjallaketur inn í landið. Eins og í hæddin uppi í fjøllinum og hitin har norðuri, eru náttúrligu treytirnar fyri at fáa virkandi lokalsamfeløg í Peru sera ymiskar, sum ger at politiska miðsavnanin er so skaðilig.

## Alt í turra lóg

Dømið um at lesa heilar lógartekstir á stadion, fyri praktiska loysn á trupulleikum, vísur eisini til vanliga politiska arbeiðið, har tað ofta verður proklamerað við flottum yvirlýsingum og lógartekstum, sum ikki hava legitimitet í fólkinum állíkavæl. Ofta kennist tað soleiðis, at atkuella valdselitan heldur, at júst við teimun skal við lóg ruddast upp í allari samfelagsskipanini, og tað endar ofta við turrum formalia, sum ongin lurtar eftir, og sum tey næstu á postinum kveistra burtur og sostatt er eingin framhaldandi tilgongd fyri at fáa eitt felags betri samfelag.

## Amor a la camisa

Afturat hesum skal leggjast, at Peru ikki hevur verið við til HM í fótbólti síðani 1982 og at landsliðið ikki klárar seg serliga væl. Stuðulin er tí heldur ikki tann størsti, kanska sum prógvum, at landið ikki serliga savnað í ein samleika, "Amor a la Camisa". Trupulleikin er eisini, at teir sum spæla yrkisfótbólt uttanlands, ikki tykjast at taka landsliðsfótbóltin í serliga stórum álvara, og har verður serliga Bayern Munchen stjørnan Pizarro kritiseraður.

Sjálv fótbóltskipanin er merkt av óskili og mutri. Vanligt er at hava sera stutt sáttmálaskeið og ofta gera spælarnir sáttmálar við fleiri feløg, tí feløgini ofta leypa frá sínum avtalum, og so er rok um hvørt felag eigur hvønn spælara. Ein avtala er ikki altíð ein avtala, soleiðis er lívið á og uttanfyri fótbóltsvøllin. Spurningurin er so um lívið ímyndast í fótbóltinum, ella fótbólturin í lívinum?

## Ungdómurin er framtíðin

Ungdómsarbeiðið verður ikki raðfest í fótbóltinum, eins og skúlaverkið ikki verður tað politiskt.

Peru hevur alt, tørvurin er miðvíst ungdómsarbeiði og langtíðar taktikkur. Kanska klárar Peru í næstum við til HM endaspælið, og so….?, tí Peru var ein stolt fótbóltstjóð í sjeyti og byrjanini av áttatiárunum, tá landið megnaði at vinna sær luttøku í HM endaspælinum í 1970, 1978 og 1982, umframt at Peru vann Copa America í 1975. Serliga var tað Teofilo Cubillas, sum er ímyndin av peruanska fótbóltsstoltleikanum og enn er leikarin við flest landsliðsmálum og sum í fjør kom á listan hjá Pele yvir teir 125 bestu livandi fótbóltleikararnar. Dømir um peruanar, sum klára seg væl á altjóða fótbóltsvøllinum eru Claudio Pizzaro og José Paulo Guererro, sum leikað í Bayern München, Nolberto Solano í Aston Villa og Jefferson Farfán í PSV og flestu eru samd um, at liðið Peru hevur til landsliðsdystir á pappírinum er gott, men úrslitini hava ikki verið hareftir og hesir kunnu kanska gera munin og geva tað sjálvsálit, sum lyftir Peru inn aftur í oddin av altjóða fótbóltsheiminum og sum gevur peruanum ein stoltleika, sum kann verða við at skumpa landið ígongd ímóti betri tíðum. Men trupulleikarnir, sum vit eisini kenna í Føroyrum, er m.a. at Solano í summar hevur boðað frá, at hann ikki er tøkur fyri landsliðið, tí hann vil savna orkuna til kappingina við fótbóltsfelagnum…. og so viknaði landsliðið longu nakað.